# Bilar

Nr. 226 • hósdagur • 25. november 2004 • 78. árg.


# Nýggjur Kia Sportage royndarkoyrdur á Mallorca

*Kia Sportage er ein sonevndur SUV (Sport Utility Vehicle), ein frítíðarbilur sum kann nýtast til fleiri ymisk endamál*




**Ein heilt nýggjur Kia Sportage kemur á marknaðin fyrst í 2006. Kvaliteturin er á sama høga støði sum á tí størra Kia Sorento, og bilurin fæst bæði sum bensin og diesel**


BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*


Kia Sportage er ein sonevndur SUV (Sport Utility Vehicle), ein frítíðarbilur sum kann nýtast til fleiri ymisk endamál.

Sportage er ein rúmligur stationvognur, samstundis sum hann er ein "offroadari", ið er premanent 4-hjólsdrivin.

Kvaliteturin er á sama høga støði sum á tí størra Kia Sorento.

Sportage fæst við trimum ymiskum motorum, einum diesel og tveimum bensin, dieselmotorurin er ein 2,0 litur CRDi við 112 hk, og bensinmotorarnir eru ein 2,0 litur við 142 hk, og síðan ein 2,7 litur V6.

Danskir motorjournalistar hava royndarkoyrt Sportage á Mallorca, og bilurin fær sera góð ummæli.



*Kvaliteturin er á sama høga støði sum á tí størra Kia Sorento*




*Sportage er ein rúmligur "off-roadari", ið er premanent 4-hjólsdrivin*

## Ellisakfør vitja Restorffs

Í kvøld - hóskvøldið 25. november - fara limir í Føroya Ellisakførum á vitjan á Restorff's Bryggjaríið í Havn. Hetta er eitt av mánaðarligu tiltøkunum, sum Føroya Ellisakfør skipar fyri. Fleiri túrar við ellisakførum hava verið gjørdir fyrr í ár, eitt nú varð skipað fyri grilldegi á Selatrað, útferð niðan á Sornfelli og Mjørkadal, vitjan í Kirkjubø, har etið varð í Roykstovuni.

Hesaferð er kortini ikki talan um ein biltúr sum so við ellisakførum, men farið verður at hyggja eftir, hvussu tey á Restorff's Bryggjarí arbeiða - hvussu øl og sodavatn verður framleitt.

Restorff's Bryggjarí er gamalt. Tað er stovnað í 1849. Tað var danin M. C. Restorff, sum kom til Havnar um hetta mundið. Hann var bakaralærdur og fór skjótt undir egið virkið. Hann hevði umframt bryggjaríið stóran handil og reiðaravirksemi - og enn tann dag í dag sæst nógv til Restorffsættina í handilslívinum í Havn.

Í 2002 yvirtóku Óla Svenn Nolsøe og Johan Mortensen - alias Olli og Johan Hot - meirilutan av partapeninginum í Restorffs Bryggjarí, og hava teir rikið tað síðani. Teir hava á sín sermerkta hátt sett sín dám á virksemið hjá bryggjarínum. Teir siga, at Restorffs er eitt slag av hobby hjá teimum - teimum dámar væl øl, og vilja teir fegnir menna hin føroyska ølheimin við nýggjum bryggjum og yvirhøvur kveikja og menna áhugan fyri øli.

Limirnir í Føroya Ellisakførum hittast í felagshølunum yvir við Strond kl 19:30. Higani verður farið út á bryggjaríið.



# VW Caddy ársins vørubilur í Danmark

**VW Caddy er kosin "Årets Varebil i Danmark 2005". Motorjournalistar frá ymiskum donskum fak- og dagbløðum royndarkoyrdu 18 vørubilar á Jyllands-Ringinum og í einum øki har nærhendis**


BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*


Ein dómsnevnd umboðandi 14 limir í Motorjournalisternes Klub Danmark (MKD) hevur kosið VW Caddy til "Årets Varebil i Danmark 2005" millum 18 aðrar vørubilar í ymiskum klassum.

Motorjournalistarnir komu frá ymiskum donskum fak- og dagbløðum.

Bilarnir vóru royndarkoyrdir á Jyllands-Ringinum og í einum øki har nærhendis.

Hugt var eftir øllum, t.d. hvussu rúmligir og væl útnyttaðir teir eru, hvussu teir eru uppbygdir, og hvussu væl teir bera vektina, tá teir eru lessaðir. Hvussu vektin ávirkar koyrieginleikarnar o.s.fr.

Grundgevingarnar fyri at velja VW Caddy til ársins vøruvogn vóru t.d., at bilurin er sum ein persónbilur at koyra, og bilførarin merkir einki til, at hann koyrir ein lutfalsliga stóran vørubil við einum vørurúmi upp á heilar 3,2 kubikmetrar. Eisini tað at Caddy er sera arbeiðsligur við stórum bakhurðum og stórari dragihurð á síðuni.

Meðan VW Caddy bleiv "Årets Varebil i Danmark 2005" bleiv Mercedes-Benz Vito "Van of the Year 2005" í Evropa.




*Ein sera væl nøgdur tíðindastjóri hjá Skandinavisk Motor Co., Henrik Hagen, við ársins vørubili í Danmark 2005, VW Caddy*

# Hættisligt við leysum lutum í lastini



*Tá lastbilurin bremsaði, fóru tey bæði innaru rørini við fullari ferð fram gjøgnum stýrihúsið, framvið bilføraranum og út á vegin og raktu bussin niðast við á síðuni*

**At tað kann vera lívshættisligt at koyra við leysum lutum í lastini, máttu ein lastbilaførari og ein bussførari í Týsklandi ásanna herfyri, tá leys rør komu sum projektil út gjøgnum stýrihúsið á lastbilinum**


FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*


Tá bussførarin á einum skúlabarnabussi herfyri kom koyrandi eftir einum høvuðsvegi í Wesel-økinum í Týsklandi, varnaðist hann ikki fyrr enn í síðstu løtu, at hann var við at renna saman við ein lastbil, sum kom frá einum síðuvegi.

Til alla lukku eydnaðist tað føraranum á lastbilinum at bremsa, áðrenn tað brast. Men tað sum hendi, í somu løtu ið lastbilurin steðgaði, kundi fingið rættuliga óhugnaligar fylgjur.

Í lastini vóru trý stór rør, sum lógu inni í hvørjum øðrum, tey vigaðu tilsamans 17 tons. Uttasta rørið var væl surrað fast, meðan tey bæði innaru rørini lógu leys innanfyri. Tá so lastbilurin knappliga bremsar, fara tey bæði innaru rørini við fullari ferð fram gjøgnum stýrihúsið, framvið bilføraranum og út á vegin og raka bussin niðast við á síðuni.

Hevði lastbilurin havt meira ferð, áðrenn hann steðgaði, høvdu rørini farið tvørtur gjøgnum bussin.

Tað var eitt undur, at ongin fekk álvarsligan skaða ella lat lív. Lastbilaførarin slapp við smásnuddum, og skúlabørnini fingu ein skelk.

Hendingin vísir, hvussu vandamikið tað kann vera at koyra við leysum lutum í lastini.

Líkamikið hvussu væl tað uttasta rørið var spent fast, so lógu tey innaru fullkomiliga leys og kundu, um illa veit við, kostað fleiri mannalív.

*Kelda: Road Life Magazine*

## Ford trygdarvestar



Ford deila komandi mánaðirnar út neongular trygdarvestar við endurskini til tey sum keypa ein nýggjan ella brúktan Ford. Í Italien og Spanien er tað lógarkrav at lata seg í slíkar vestar, um ein t.d. skal skifta hjól ella annað uttan fyri bygd øki

*Kelda: Motor Magasinet*

## VW 20 ár í Kina



Liðin eru 20 ár síðan VW-konsernin gjørdi avtalu um samstarv við Shanghai Automotive Industry Corporation í 1984. Hesi árini hava teir latið meira enn 4 mill. bilar til kinesiskar kundar frá umleið 1.000 sølustøðum kring landið

*Kelda: Motor Magasinet*

## 30.000 bilverkstøð lata aftur



Í Evropa væntast at meira enn 30.000 bilverkstøð mugu lata aftur áðrenn 2008, stendur í eini frágreiðing frá analysustovninum Datamonitor í Onglandi. Orsøkirnar eru t.d. lítil vøkstur í bilasøluni, og at bilarnir halda so væl

*Kelda: Motor Magasinet*